# Sannførandi sigur til TB

**Tvørakvinnur hava fyribils lagt seg á odda í meistaradeildini hjá kvinnum í flogbólti**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Eingin avgerð er enn fallin í kappingini um meistaraheitið hjá kvinnum í flogbólti. Undan dystunum, sum vóru ásettir til at verða í vikuskiftinum, vóru Mjølnir og TB púra jøvn í stigum, men Mjølnir hevði væl betur settmun.

### Útsett í Klaksvík

Eftir ætlan skuldu tríggir dystir spælast um vikuskiftið, men dysturin millum oddaliðið Mjølnir og botnliðið SÍ, sum skuldi verða í Klaksvík sunnudagin, bleiv útsettur orsaka av vánaliga veðrinum, sum var sunnudagin. Ístaðin verður dysturin spældur mikukvøldið.

Men í Trongisvági var dystur. Har hevði heimaliðið TB fingið vitjan av KÍF úr Kollafirði, og her var ongantíð nakar ivi um, hvat var betra liðið. TB var snøgt sagt ein klassa betur enn KÍF, og tær vunnu ein greiðan 3-0 sigur.

Fyrsta settið var skjótt avgreitt, tí TB vann stórt 25-11. Tey bæði næstu settini vóru heldur ikki serliga jøvn, tí í báðum førum vann oddaliðið 25-16, og harvið endaði dysturin við einum greiðum 3-0 sigri til TB.

Hin dystur, sum bleiv spældur um vikuskiftið, var á Kambsdali, har ÍF fekk vitjan av Drátti. Ikki kann sigast annað, enn at Dráttur fullkomiliga er steðgað upp seinastu trý umførini, eftir at tær annars vóru um reppið at vinna seg upp á oddasessin.

Tveir teir undanfarnu dystirnar hevur Dráttur tapt fyri ávíkavist TB og Mjølnir á Giljanesi, og hesaferð vóru tær við undirlutan móti ÍF á Kambsdali, tí heimalið-ið vann 3-1.

TB hevur sostatt lagt seg á odda í meistaradeildini, men helst verður tað bara til mikukvøldið, tí tað er ógvuliga sannlíkt, at Mjølnir vinnur á SÍ. Tað merkir, at Mjølnir tá endurvinnur oddasessin, tí tær hava betur settmun enn TB.



*Sørvingar vunnu eisini seinasta dystin á árinum, og so kundu teir fagnast, tá steypahandanin stóð fyri framman*

*Mynd: Olivur Joensen/Norðlýsið*

# SÍ endaði við sigri

**Kappingarárið hjá greipuvinnarunum úr SÍ er komið at enda, og sørvingar endaðu árið við at vinna á útivølli móti silvurvinnarunum úr Mjølnir**

FLOGBÓLTUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Eitt framúr gott kappingarár hjá mansliðnum hjá SÍ er komið at enda. At vinna bæði steypakapping og meistaraheitið, ella greipuna, sum tað eisini verður rópt, er ikki so galið, og tá ið tað verður gjørt sama ár, sum felagið hátíðarheldur sín 100 ára føðingardag, so kann ikki sigast annað, enn at væl var "timað".

### Ósigraðir síðani oktobur

Sørvingar hava verið í einum flokki fyri seg í ár, og tað sigur ikki so lítið, at SÍ ikki hevur tapt ein einasta dyst síðani oktobur mánað í fjør. Liðið hevur sópað alla mótstøðu av vøllinum, og tað er longu langt síðani, at avgerðin um meistaraheitið fall.

Leygardagin vóru sørvingar í Klaksvík og spældu síðsta dystin á árinum, og tað var kanska eisini hóskandi, at tað júst vóru meistararnir frá í fjør og mótstøðumenninir í steypafinaluni, sum stóðu hinumegin netið, tá ið SÍ leikti síðsta dystin á árinum.

Mótstøðan leygardagin var eisini harðari, enn hon hevur verið í mongum av teimum seinastu dystunum hjá SÍ. Klaksvíkingar vunnu fyrsta settið rættuliga greitt 25-17, og tað var sum um, at teir góvu sørvingum ein hvøkk.

Men SÍ reisti seg, og teir vunnu næsta settið 25-17. Í triðja settinum vóru meistararnir eisini við yvirlutan, og teir vunnu settið 25-18. Tískil kundi SÍ tryggja sær sigurin við at vinna fjórða settið, og tað gjørdu sørvingar eisini. Men tað var lættari sagt enn gjørt, tí Mjølnir beit væl frá sær, og settið var rættuliga javnt. Men SÍ hevði munin og vann settið 25-22 og harvið dystin 3-1.

### Fleyr røkkur ikki silvurinum

Hin dysturin, sum var leiktur í meistaradeildini hjá monnum um vikuskiftið, var á Kambsdali, har ÍF hevði vitjan av Fleyr. Havnarliðið hevði undan dystinum framvegis møguleikan at tryggja sær silvurheiðursmerkir, men tað kravdi, at teir vunnu dystin móti fuglfirðingum.

Men ÍF vildi tað øðrvísi, tí teir gjørdu bart og vunnu dystin greitt 3-0. Harvið misti Fleyr møguleikan at fáa fatur aftur á Mjølnir, sum liggur á silvurplássinum, og havnarmenninir noyðast tí at taka til takkar við bronsuni í ár.

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 19 | 16 - 3 | 50 | 22 | 28 | 23 |
| 2 Mjølnir | 18 | 15 - 3 | 47 | 15 | 32 | 21 |
| 3 Dráttur | 19 | 10 - 9 | 40 | 33 | 7 | 16 |
| 4 ÍF | 19 | 9 -10 | 33 | 34 | -1 | 14 |
| 5 KÍF | 19 | 5 -14 | 19 | 45 | -26 | 6 |
| 6 SÍ | 18 | 1 -17 | 12 | 52 | -40 | 2 |

### Meistaradeild, menn

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 16 | 15 - 1 | 46 | 12 | 34 | 23 |
| 2 Mjølnir | 15 | 10 - 5 | 35 | 20 | 15 | 14 |
| 3 Fleyr | 15 | 8 - 7 | 28 | 29 | -1 | 11 |
| 4 ÍF | 15 | 4 -11 | 19 | 36 | -17 | 7 |
| 5 Fram | 15 | 1 -14 | 12 | 43 | -31 | 1 |

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo